# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Alberg Danielsen**, ættaður av Kelduni í Sørvági, búsitandi í Rødovre, andaðist týsdagin 11. november á Herlev Sygehus, 83 ára gamal. Jarðarferðin verður fríggjadagin 21. november kl. 13 úr Rødovre Kirke.

## Dagurin

**19. november. Elisabeth,** deyð í 1231. Dóttir ungarska kongin Andras. 14 ára gomul varð hon gift týskum greiva, men hann doyði stutt eftir á eini krossferð.

†

Kunngjørt verður, at lítli sonur og beiggi okkara

**Jákup Tausen**
f. 29. okt. 2008 - d. 15. nov. 2008

andaðist á Hjørring sjúkrahúsi.

*Familjunnar vegna*
**Joan, Jaspur og døturnar**

# Tøkk



Hjartaliga takki eg tykkum, sum gjørdu mær 100 ára føðingardagin 28. oktober so hugnaligan.
Øll tit, sum frá nær og fjar í Føroyum og uttanlands heiðraðu meg við at koma til føðingardagshaldið og á annan hátt minnast til mín, fylla mítt hjarta við takksemi.
Takk fyri talur og sang.
Gud signi tykkum øll.

**Theodor Thomassen, Sørvágur**

# Minningarorð um Úlf Hjörvar, rithövund

**(f. 22. apríl 1935 – d. 9. november 2008)**



Tað eru lötur, tá ið orð vilja standa föst í hövdinum. Ein slík löta var lötan henda morgunin herfyri, ið deyðsboðini av mentamanninum Úlfi Hjörvar bórust. Kortini var tað ikki hvøkkurin, sum javnan fylgir deyðsboðum, um enn tey koma misóvart á.

Ella ið hvussu er ikki bara.

Tað var annað, sum fekk orðini at stöðga so dáttliga við.

Summi fólk eru so stillfør av natúr, gera so lítið hóvasták burtur úr sær sjálvum, at tú ikki beinanvegin, ja mangan als ikki gevur tær far um tann mun, tey gera tær, fyrr enn tú knappliga, úr fjarleika, varnast, hvussu stórt innsig kortini er komið frá teimum í títt egna sinn og sjálvstilvit.

Eg kom at kenna Úlf, tá ið tey bæði hann og kona hansara Helga fluttu til Føroya og hon tók við stjórastarvinum í Norðurlandahúsinum. Serliga árini sum Listastevnan var (eitt framtak Helga átti æruna av) hevði eg nógv samskifti við hjúnini bæði og tók mær satt at siga eisini fyri at týða okkurt eftir Úlf, tað var smásögan *Illa fara orðini* (og hon stendur nú á prenti í Vencli nr. 4). Eg taki söguna fram í hesum viðfangi av tí, at hon eftir mínum tykki lýsir væl tað samblandið av álvara og fyndarríkum speii, ið eyðkendi hugburðin hjá Úlfi til eina óskoytna samtíð, sum vil sigla eftir kumpass, ið ikki bert er keypskvik, men viðhvørt eisini kann tykjast vera farin heilt av nálini andliga og hegnisliga.

Sum mentamaður var Úlfur altjóðasinni og hoyrdi til tað eftirkrígsættarliðið av ungum íslendingum, sum frá hálvtrýssunum og frameftir ruddu íslendskum mentaskapi nýggjar rásir. Tað gjørdi hann m.a. við fjölmongu týðingum sínum úr ymsum málum, enskum og fronskum t.d., av alskyns bókmentum: leikritum, skaldsögum og yrkingum. Men Úlfur var samstundis eisini tjóðtrúgvur í sær (tað mundi, sum vit føroyingar siga, liggja til slagið) og hetta hoyrdist eisini aftur í orðalagið hansara (og her meini eg sjálvandi við, hvussu hann málbar seg á íslendskum). Samrøður við hann vóru stundum einki öðrvísi enn at standa við eina av hesum áunum, ið falla um íslendsku slættlendini breiðar, lagarmiklar og stríðar. Tú sansaði, at her runnu víðgreindir løkir í at kalla allastaðni úr íslendskari mentan bókligari sum fólksligari, eldri sum nýggjari, og tú skilti til fulnar, at eldhugi fyri tí, sum uttaneftir kemur, tí altjóðaliga, av sonnum ikki er ósambæriligur við trúskap og álit á sínum egna mentanararvi, tvørturímóti, útlendskt og innlendskt treyta hvørt annað í einum samspæli, sum í senn er gagnligt og neyðugt til endurnýggingar.

Eg fari at enda hesi fáu minningarorð um Úlf Hjörvar við eini týðing av einari lítlari perlu, sum kom fram fyri meg, nú eg frætti, at hann var farin í annað ljós. Hetta er ein yrking eftir íslendska tjóðskaldið, Jónas Hallgrímsson, yrkt í 1844 (á upprunamálinum eitur hon *Alsnjóa*).

### Kavaland

Ævigur skarin í eyguni á mær
ørast og glampar nær og fjar,
sami og sami í allar ættir,
einstaklingur! statt nú fattur.

Deyðin er reinur og fonnin er hvít,
foli hjartans gongur við lít
og stendst á útbreiddum laki,
undir er jörðin í brandabaki.

Víst ert tú móðir! góð við oss,
arma jørð, ið bert tungan kross,
lyftir tað seg alt í dýrd og liti,
lívið og deyðin, kuldi og hiti.

Helgu og familju vátti eg samkenslu mína.

Friður veri við minninum um Úlf Hjörvar.

Í Havn 18. november 2008
Carl Jóhan Jensen

Fyri 30 árum síðan:

# Nýtt vaktarskip í 1978

Í november 1978 kom "nýggja" vaktarskipið hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni, Ólavur Halgi, flaggskrýtt á Havnina.

Skipið var fyrrverandi trolari úr Fuglafirði, bygdur í Viana do Castel í Portugal í 1959.

Umbyggingin av Ólavi Halga, sum fór fram á Svendborg Skibsværft í Danmark, kostaði umleið fimm milliónir krónur.

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1979*

